fyrrverandi lærara og starvsfelaga mín, Guttorm Zachariassen, at hyggja tær ígjøgnum og skriva tær á teldu. Havi seinnu árini sent fleiri av hesum yrkingum til Dimmalætting, sum síðan hevur prentað tær.

Elin sigur, at út við fimmti yrkingar munnu vera í hesum savni, og hesar snúgva seg, sum hon sjálv sigur, um alt tað vanliga – um lívið.

- Yrkingarnar snúgva seg eisini um tað at vera við tað góða orðið – um ikki at tosa illavorðið, ikki at tosa um onnur og um, at eydnan er at finna, har tú ert og ikki neyðturviliga hjá øðrum.

Um heitið á savninum *Smáputl*, sigur hon, at hugskotið til navnið kemur frá nøkrum yrkingum, sum pápi hennara, Jóhan, sum eisini var lærari, einaferð skrivaði og kallaði *Poetisk bagatellir*.

- Hesar yrkingarnar hjá pápa mínum komu ongantíð út. Eg havi goymt tær hesi mongu ár, men havi síðan latið tær til Landsskjalasavnið, har upprunahandritini nú eru goymd.

Hon sigur, at pápi hennara eitt skifti las teologi í Danmark, men hann helt ikki, at tað júst var hann at skula prædika fyri øðrum.

- Hann fór síðan at lesa til lærara í staðin og var leingi lærari við preliminerskúlan á Tvøroyri, leggur hon aftrat.

**»… tá eyguni fóru at bila, fekk eg ikki so væl skrivað nakað serligt longur. Nú skrivi eg yrkingar við einum tusjpenni…**

ELIN MORTENSEN

### Evnir í vøggugávu

Elin Mortensen sigur, at hóast hon er best kend fyri tíðina sum lærari gjøgnum so mong ár, og tær bøkur hon hevur skrivað, so hevur hon altíð yrkt nógv.

- Men hetta hevur mest verið í samband við ymisk høvi og hátíðardagar í familjuni. Í familjuni hjá okkum hevur nógv verið skrivað og yrkt og beiggi mín, Eilif Mortanson, sáli, yrkti altíð – og var óførur yrkjari. Beiggi mín Aksel, sum doyði herfyri, hevur eisini skrivað, og seinni hava vit sæð, at eitt nú bróðirdóttir mín, Armgarð Arge, eisini hevur dugað sera væl at skriva og sett saman. Eg haldi, at vit hava fingið hesi evni í vøggugávu frá pápa mínum, heldur hon fyri.

Elin heldur, at Armgarð Arge dugir einastandandi væl at skriva.

- Eg var rættiliga sannførd um, hvør høvundurin á sinni var til klummuna í Kringvarpi Føroya. Stutt áðrenn freistin at atkvøða um hetta var úti, stakk tað í meg, at tað óivað var Armgarð, sum hevði skrivað – og rætt varð. Klummurnar søgdu mær tó, at Armgarð eisini hevur ein rættiliga humoristiskan sans, sum Elin Mortensen tekur til.

### Eingin stúran

Spurd, hvussu tað ber til, at hon sum nítiára gomul er so væl fyri, sum hon í veruleikanum er, sigur føðingardagsbarnið og høvundurin.

- Tað dugi eg ikki ordiliga at siga, men eitt er, at eg eri ørvingur og suðuroyingur blandað við ættarbondum úr Nólsoy. Annað er, at eg ongantíð havi stúrt fyri nøkrum. Eg tími ikki at stúra, og eg tími ikki at stúra meg út á sjógv, sum hon tekur til.

Elin sigur, at pápi hennara ofta var deknur við Tvøroyrar kirkju, og tá kirkjuklokkan ringdi vóru tey í kirkju.

- Alt var á donskum, men eg helt ongantíð, at kirkjan var keðilig, sum ofta verður ført fram.

Hon dylir ikki, at hon er gudrøkin, og at hon gjøgnum alt lívið hevur sett sítt álit á eina hægri makt, og hon dylur heldur ikki, at tað er hetta, sum hevur gjørt allan munin, sum hon sjálv tekur til.

- Eg livi dagin í dag. Dagurin í gjár er farin, og morgindagin veitst tú einki um. Við trúnni á Guð er ikki neyðugt at stúra, leggur hon aftrat.

### Elskar at ganga

Hóast høga aldurin, er Elin Mortensen væl gongd, og eyguni bila ikki til at ganga túrar.

- Eg elski at ganga túrar og fari gjarna tvær ferðir um dagin oman í býin. Mær dámar væl at hitta fólk og práta, og tað er ofta á slíkum túrum, eg fái íblástur til tað, eg skrivi – og nú yrki. Okkurt hugskot kemur frá fólki, eg práti við á vegnum, og okkurt hugskot kemur úr náttúruni. Mær dámar væl sosialu samveruna, bæði úti og heima, sigur Elin Mortensen.

Vit ynskja henni hjartaliga tillukku við degnum.

### Hvør er Elin?

Elin Henrietta Elisabeth Mortensen er fødd á Tvøroyri 26. mai 1920. Foreldrini vóru Johan Mortensen, lærari, ættaður úr Øravík og Cathrina Maria, fødd Nolsøe, av Tvøroyri. Hon tók preliminerprógv í 1936 við Tvøroyrar skúla. Var í Danmark árini 1938-1939, har hon ansaði børnum. Hon starvaðist í handli hjá bróðuri sínum Axeli árini 1939-1946. Var í Bretlandi 1946-1947. Vikarur við Trongisvágs og Tvøroyrar skúla 1947-1963 og var samstundis bókavørður á Tvøroyrar bókasavni.

Elin fekk fast starv við Sankta Frans Skúla í Havn í 1963, og her starvaðist hon til 1987, tá hon fór frá vegna aldur.

Hon hevur givið út ein hóp av bókum og heftum, bæði einsamøll og saman við øðrum – til lesnað og eins og til skúlaundirvísing.

Útgivnar umsetingar eru eisini fleiri í tali.

Skaldsøgurnar, sum Elin Mortensen hevur givið út, eru *Sanna í summarfrí* (1979), *Sanna og Marjun* (1983), *Barn undir krígnum* (1990), *Ljósini sloknað – Ung undir krígnum* (1996) og *Heimbygd mín, Tvøroyri* (2001).

*vilmund@sosialurin.fo*



## Miðlar

Dagfinn Olsen



# Mál!

Miðlarnir hava stóran týdning í gerandisdegnum, hóast umstøður broytast, og miðlaútboðið somuleiðis, og eisini korini hjá einstøku miðlunum, hvørt tað so er blað, ella net- ella loftmiðil.

Fremsti miðil okkara er, skal og eigur at vera, Kringvarpið. Flest øll vita vit, hvønn týdning Útvarp Føroya tey fyrstu mongu árini hevði á føroyskt mál og mentananrlív.

Hóast hesin týdningur seinastu árini er tódnaður, er eingin orsøk at slaka í góðskuni. Og Kringvarpið er ikki so galið. Her hugsi eg serliga um útvarp. Tí nakað veruligt alment sjónvarp hava vit ongantíð havt í Føroyum, hóast vit fingu eitt alment sjónvarp í 1984, bygt á akslarnar á lokalu sjónvarpsfeløgunum, ið gingu undan og vístu veg.

Útvarpið sendir hvønn einasta dag. Ongin dugur at ímynda sær ein dag – gerandis ella heilagt, har Útvarp ikki hoyrist.

Men føroyskt sjónvarp, ið frammanundan bert sendir lítlan part av egnum tilfari, sendir ikki t.d. eina tíðindasending, um talan er um heilidag. Hetta vísir í veruleikanum eitt sindur um støðið. Hugsið tykkum um útvarpið gjørdi tað sama. Har er enntá fólk á vakt jólaaftan.

Føroyska sjónvarpið hevur veruliga sett nakrar góðar sendingar á skrá seinasta árið, ella so. Men samstundis er tíðindasendingin Dagur og Vika fánað og er als ikki tað flaggskip, sum hendan sending einaferð var. Helst er miðilin vorðin ov tungur, tí ofta er talan um somu tíðindi, sum ein hevur hoyrt ella sæð gjøgnum dagin (ella enntá dagarnar, síðani Dagur og Vika var seinast).

Rætt skal vera rætt. Nakrar broytingar eru farnar fram í Degi og Viku síðstu vikurnar, og hetta tykist vera stig á leiðini til eina betri sending.

Miðlaheimurin broytist støðugt, og ein kann skriva og kjakast longi um hetta.

Men eitt er, ið ikki broytist so skjótt, og tað er føroyska málið, sum eg eisini havi umrøtt í hesum teiginum áður. Ætlaði ikki at gera enn eina roynd hesaferð at bøta um, men fari hóast alt at taka tvey dømi fram, sum eg hoyrdi í hesi vikuni í loftmiðlunum.

»Hesuferð« var einaferð ein felagskapur, stovnsettur av tjóðskaparhugaðum. Um talan ikki er um henda felagsskap, so eitur tað »hesaferð«. Og tað ljóðar eisini betri at siga sló, enn slerdi!

Mál!

Men so til nøkur onnur mál, nevniliga tey í 3-2 í sjónvarpinum.

Eg haldi tað er ófatuligt, at allir teir ymsu frásøgumenninir eru redigeraðir soleiðis, at teir avdúka hvat hendir á vøllinum, umleið 2 sekund innan tað hendir.

Tá ein við spenningi sær føroyskan ella útlendskan fótbóltsleikara nærkast málinum, so sigur frásøgumaðurin – beint innan leikarin ger seg til reiðar til skot, hvussu ella hvar hesin bólturin endar. Og tá tað er avdúkað, so kann ein bert nikkandi sita eftir og staðfesta, at frásøgumaðurin hevður rætt. Hetta er høpisleyst, tí tá er onki við at síggja dystin. Ber ikki til at laga tað so, at frásøgumaðurin sigur tað samstundis ella aftaná?

Og so fari eg aftur til málstrev, tí eg má minna á, at tað eitur við síðuna av. Ikki við síðurnar av, tí tá er talan um meira enn eina síðu, og bólturin kann t.d. ikki skjótast við síðurnar av málinum, tí bólturin kann ikki fara báðumegin málið. So fingu vit tað við eisini.

*Í mikudagsblaðnum ummæla skiftandi fólk fjølmiðlarnar.*